Jacob Vestergaard
Steffan Klein Poulsen
Bárður á Lakjuni
Jenis av Rana
løgtingsmenn

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 69/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya (Løgtings- og landsstýrismenn v.m., broytt starvsheiti)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 1 verður § 1 a, nr. 1 orðað soleiðis:
   "1) løgtingsfólk, er almenna starvsheitið løgtingsmaður ella løgtingskvinna."

2. Í § 1, nr. 1 verður § 1 a, nr. 3 orðað soleiðis:
   "3) landsstýrisfólk, er almenna starvsheitið landsstýrismaður ella landsstýriskvinna."

Viðmerkingar:

Við hesum broytingaruppskoti verður staðfest, at starvsheitið verður antin løgtingsmaður ella løgtingskvinna, og er hetta sama broytingaruppskot, sum minnilutin í § 25 – nevndini setti fram í álitinum til 2. viðgerð.

Sambært uppskotinum frá formansskapinum verða nýggju starvsheitini í útgangsstøðinum løgtingsfólk og landsstýrisfólk, tó soleiðis at hesi eisini ***kunnu*** velja at nevna seg sjálvi løgtingsmaður ella løgtingskvinna og landsstýrismaður ella landsstýriskvinna.

Uppskotssetararnir ynskja, at starvsheitið ***eru*** løgtingsmaður ella løgtingskvinna og landsstýrismaður ella landsstýriskvinna, tá ið lógarteksturin brúkar heitini løgtingsfólk og landsstýrisfólk.

Á Løgtingi, 17. mai 2023

Jacob Vestergaard Steffan Klein Poulsen

Bárður á Lakjuni Jenis av Rana